## Russar keypa norskan fisk

Norski fiskavøruútflutningurin minkar støðugt, men samstundis kunnu norðmenn fegnast um, at russiski áhugin fyri norskum fiskavørum er veksandi. Tað eru serliga laksur og síl, sum russar vilja hava úr Noregi.

Í juli keyptu russar norskar fiskavørur fyri 95 milliónir norskar krónur, og tað var tvær ferðir meiri enn í juli í fjør. Tað merkir, at Russland var fimtistørsti fiskamarknaðurin hjá norðmonnum. Teir størstu eru Danmark, Frakland, Japan og Týskland. Sølan til Japan minkaði kortini í juli, og soleiðis var eisini við søluni til bretska marknaðin.

Í juli útfluttu norðmenn fiskavørur fyri 1,6 milliard norskar krónur, og higartil í ár er útflutningsvirðið 15,6 milliardir krónur. Tað er ellivu prosent minni enn sjey teir fyrstu mánaðarnar í fjør. Tað eru serliga toskur, rækjur og fiskamjøl, sum minni er selt av í ár, og tað eru serliga bretski og japanski marknaðurin, sum svíkja. Eitt nú var sølan til Bretlands 43 prosent minni í juli enn í juli í fjør, og á japanska marknaðinum var afturgongdin 32 prosent.

## 700 skulu gravast uppaftur

Tann 1. juli í 1992 savnaði serbiski herurin allar menn í bosnisku bygdini Bijeli Potok og flutti teir burtur haðani. Síðani hevur eingin hoyrt nakað frá teimum.

Nú verður hildið, at teir horvnu menninir kanska eru at finna í einari hópgrøv við Crni Vrh, sum varð funnin herfyri, og sum er tann størsta hópgrøvin, sum higartil er funnin í Bosnia. Serfrøðingar halda, at um leið 700 lík eru í hópgrøvini, og teir halda, at serbisku hermenninir hava savnað lík úr øðrum hópgravum og flutt tey higar í einari roynd at fjala tey.

Avvarðandi hjá teimum monnunum, sum hvurvu úr bygdini Bijeli Potok, eru komin til Crni Vrh at vita, um ein maður, sonur, bróður, pápi ella abbi eru at finna har. Men í hvussu er summi verða noydd at bíða leingi, tí sambært serfrøðingunum fer tað at taka einar níggju mánaðir at grava øll líkini uppaftur.

## Fekk háv í garnið

Petter Danielsen úr Mandal í Noregi fekk í vikuni ein bláhav í eitt av gørnunum, sum hann hevði sett á 200 favna dýpi.

Bláhávurin var einar fýra metrar langur og vigaði um 500 pund. Hann var deyður, tá hann kom inn í bátin. Petter Danielsen sigur við blaðið Aftenposten, at hevði hávurin verið livandi, hevði hann slept honum útaftur, men tá hann kortini var deyður, helt hann, at hann skuldi taka hann við sær til lands, so onnur kundu sleppa at síggja tann sjáldsama fongin.

Og sjáldsamur fongur var hetta, tí bláhávurin heldur vanliga til á teimum subtropisku leiðunum. Norskir fiskifrøðingar siga, at bláhávurin stundum er at síggja vestan fyri bretsku strondina og vestan fyri Írland, har hann livir av sild, makreli og øðrum fiski, sum ferðast í torvum.

## Næskur myndamaður

Løgreglan í svenska býnum Sundsvall tók í vikuni ein 29 ára gamlan mann, sum hevði til ítriv at taka myndir av kvinnum, sum passaðu klæðir í passingarrúmunum í klædnahandlunum í býnum.

Tann 29 ára gamli maðurin hevði havt hetta ítrivið í fleiri ár, uttan at nakar hevði varnast, hvat hann tókst við. Men í vikuni varð hann avdúkaður. Tað hendi, tá tvær ungar kvinnur brádliga sóu eitt myndatól verða stungið inn undir forhangið í passingarrúminum, sum tær vóru í. Tá tær ryktu forhangið frá, sóu tær mannin standa við myndatólinum í hondini.

Seinni um dagin varð myndamaðurin tikin. Tá løgreglumenninir fóru at kanna teldu hansara, komu teir fram á fleiri túsund myndir, sum maðurin hevði tikið í ymsum passingarrúmum. Allar myndirnar vóru av kvinnum.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Krevja nýggja kanning av vanlukkuni við »Kursk«

**Fyrradagin vóru trý ár, síðani russiski kavbáturin »Kursk« sakk í Barentshavinum. Tey avvarðandi hjá teimum, sum doyðu, vilja hava málið kannað av nýggjum**

KURSK-VANLUKKAN

*Árni Joensen:*

118 russiskir herflotamenn lótu lív, tá »Kursk« fór til botns í Barentshavinum tann 12. august í 2000. Á ársdegnum fyri vanlukkuna hevur verið skipað fyri minningarhaldi í fleiri russiskum býum, og soleiðis var eisini týsdagin.

Avvarðandi hjá teimum, sum doyðu við »Kursk«, halda seg framvegis ikki hava fingið allan sannleikan um tað, sum hendi aftaná, at kavbáturin fór til botns. Tað kom fram, at 23 av manningini vóru á lívi eina tíð, eftir at kavbáturin var sokkin, og tey avvarðandi vilja vera við, at myndugleikarnir vóru alt ov skjótir at gevast við royndunum at bjarga teimum 23 monnunum.

Moskva-blaðið Novaja Gazeta skrivaði í gjár, at 40 familjur hava sent myndugleikunum bræv, har tær krevja, at alt málið um »Kursk« verður kannað av nýggjum, tí tey kenna seg sannførd um, at myndugleikarnir dylja týðandi upplýsingar. Nevndin, sum kannaði vanlukkuna, kom til ta niðurstøðu, at teir 23 menninir livdu bert nakrar tímar aftan á vanlukkuna, men tey avvarðandi vilja vera við, at menninir kanska vóru á lívi í tvey samdøgur, eftir at »Kursk« kom at liggja á botni í Barentshavinum. Tað hevur ikki gjørt illgrunan minni, at myndugleikarnir hava gjørt av, at øll skjøl í sambandi við vanlukkuna skulu haldast loynilig í 25 ár.

Tann kjarnorkurikni kavbáturin sakk norður úr Murmansk eftir eina spreinging í torpedorúminum.




*Fýra ára gamla Kristina við gravsteinin hjá pápa sínum, sum doyði við kavbátinum »Kursk«*

# Sjálvstýrari skal forða flogránum

**Amerikanska fyritøkan Honeywell hevur gjørt ein nýggjan sjálvstýrara, sum skal forða fyri, at flogfør verða rænd og nýtt til yvirgangsatsóknir.**

FLOGTRYGD

*Árni Joensen:*

Tann nýggi sjálvstýrarin skal millum annað forða fyri, at eitt flogfar rennir á eini hús, og endamálið við honum er at fyribyrgja vanlukkum av tí slagnum, sum vóru í USA tann 11. september í 2001.

Amerikanska elektronikkfyritøkan Honeywell hevur gjørt tann nýggja sjálvstýraran í samstarvi við evropeisku flogverksmiðjuna Airbus, og sambært verkfrøðinginum Don Bateman fer Airbus at royna ta nýggju útgerðina í einum av sínum flogførum eina ferð næsta ár.

Trygdarserfrøðingar siga, at amerikanska loysnin er áhugaverd, men teir halda ikki, at tað ber til einans at seta sítt álit á teknologiskar loysnir í hesum høpi. Teir vísa í hesum sambandi á ein tilburð á John F. Kennedy-floghavnini í New York seinasta sunnudag.

Har komu fólk fram á tríggjar stuttleikafiskimenn, sum gingu og váløðu á einari av flogbreytunum. Tað vísti seg, at menninir høvdu verið í einum lítlum báti, sum var rikin á land, haðani teir vóru komnir inn á flogbreytina, uttan at trygdarskipaninar góvu nakað tekin frá sær.

# ítróttur

Nr. 151 • hósdagur • 14. august 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Hjalgrím ræðist ikki Molde

**Tá ið toppskjúttin í føroysku landskappingini minnist, hvussu tað hilnaðist hjá KÍ í europeisku kappingini í fjør, heldur hann onga orsøk vera at kvíga fyri stórtapi í kvøld**

KÍ Í EUROPA CUP

*Jóannes Hansen*

**SOSIALURIN-MOLDE:** Hjalgrím Elttør hevur havt undanvind síðstu dagarnar. Sunnudagin skoraði hann fýra mál, og undan fráferðini úr Føroyum týsdagin fekk hann landsliðsboð. Tey fýra málini ímóti EB/Streymi hava við sær, at hann er toppskjútti í landskappingini.

*Hevur tú áður skorað fýra mál í einum dysti?*

- Tað havi eg ongantíð áður gjørt í vaksnamannadeildini. Í yngru deildunum skoraði eg ofta nogv mál. Seinasta ferðin eg minnist, at tað eydnaðist at skjóta nógv mál, var í steypafinaluni í unglingadeildini í fyrraárið. Tá haldi eg meg minnast, at eg skoraði seks mál.



*Seinast Hjalgrím Elttør skoraði fleiri enn fýra mál var í steypafinaluni í unglingum, tá hann skeyt seks mál ímóti ÍF*

### Góðar royndir

Tá ið vit tosa um uppgávuna, sum er á skránni hjá Hjalgrími og KÍ í kvøld, kann hon tykjast ógvuslig. Vandin fyri stórtapið lúrir altíð, men toppskjúttin er ikki bangin fyri, at tað skal ganga av skriðuni.

- Tað er sjálvandi ilt at siga. Men um vit nýta royndirnar frá í fjør, so nýtist okkum ikki at stúra. Tá spældu vit ímóti ungverska Újpesti. Á heimavølli megnaðu vit 2-2. Tá ið vit fóru niður til Budapest lúrdi vandin fyri stórtapið ivaleyst, men vit taptu bara 1-0. Ofta hevur tað víst seg, at føroysk lið hava havt tað torført í 2. hálvleiki, tí orkan hevur ikki verið tann sama, sum hon hevur verið hjá mótstøðuliðunum, men soleiðis var tað ikki hjá okkum ta ferðina. Síðstu løtuna trýstu vit teir, og eg sendi bóltin í stólpan. Tá ið vit nú hugsa aftur á dystirnar í fjør, so var møguleikin ivaleyst størri at koma víðari í kappingini, enn vit frammanundan høvdu roknað við, minnist Hjalgrím Elttør aftur á, og hann leggur afturat:

- Føroysk lið fara neyvan at røkka langt í europeisku kappingini. Sjálvandi hevði tað verið hugaligt hjá okkum sum fyrsta føroyska felagið nakrantíð at spælt okkum víðari úr fyrsta umfarinum. Men í løtuni hugsa vit fyrst og fremst at røkka einum so mikið góðum úrsliti á útivølli, at tað verður spennandi hjá okkara áskoðarum og okkum, tá ið Molde um tvær vikur kemur at vitja okkum.

### Upp og niður

KÍ var fyrsta føroyska felagið, sum royndi seg í Europa Cup í 1992. Síðani hevur tað gingið eitt sindur upp og niður. Í 2000 var KÍ í fyrsta innleiðandi umfarinum í kappingini fyri meistaralið, og tá gekk tað av skriðuni ímóti eysturríkska liðnum.

Frammanundan hevur KÍ staðið seg væl á Svangaskarði ímóti ísraelska liðnum Maccabi Haifa. Ímóti Skonto Riga í 1992 tapti KÍ báðar dystirnar.

Molde er ikki væl fyri í norsku kappingini. Norskur fótbóltur verður kortini skattaður so mikið hægri enn føroyskur fótbóltur, at eingin ivi er um, at norska liðið er stórfavorittur á heimavølli í kvøld. At klaksvíkingar kanska kunnu megna meiri, enn tað kann roknast við, er ein onnur søga. Men teir hava áður víst, at møguleiki er fyri tí. Umstøðurnar at spæla fótbólt í Molde í kvøld verða ivaleyst góðar. Í gjár vóru umleið átjan hitastig, stilli og einki avfall. Tað mugu sigast at vera optimalar umstøður at spæla fótbólt í.



*KÍ-leikararnir spenna frá undan dystinum ímóti Molde í kvøld*

*Mynd: Norðlýsið*